Skrá fyri apríl 2019

Mikukvøldið 3. apríl kl. 19.30
Bønarmøti og orðið frítt

Sunnudagin 7. apríl kl. 18.00
Tom Roberts, Bahamas
Vitjar aftur á gamlar slóðir. Talan verður tulkað til føroyskt.

Mikukvøldið 10. apríl kl. 19.30
Kirstin & Símin Jóhan Samuelsen
Luta orð og tankar út frá Skriftini og teirra lívsroyndum.

Sunnudagin 14. apríl kl.18.00
Dubby & Anna (Fuglø) Rodda
Greiða frá trúboðaraarbeiði í Senegal og tala um "Lat okkum halda áfram at tæna Meistaranum, meðan vit enn kunnu!"

Mikukvøldið 17. apríl kl. 19.30
Orðið frítt

Mikukvøldið 24. apríl kl. 19.30
KFS - Ragnhard Petersen
Greiðir frá arbeiðinum, KFS ger ímillum næmingar á miðnámskúlum og fróðskaparsetri.

Sunnudagin 28. apríl
Húsbólkar

Hvønn sunnudag – *vanliga*
Kl. 11.00: Møti og sunnudagsskúli
Kl. 18.00: Møti
Hvørt mánakvøld *í vetrarhálvuni:*
Kl.20.00: Tannbit 8.- 10.fl.
Hvørt týskvøld *í vetrarhálvuni:*
Kl. 19.00 U-alpha 5.- 7.fl.
Hvørt mikukvøld
Kl. 19.30: Bøn og bíbliulæra

FRÁGREIÐINGAR UM MØTI OG TILTØK Í APRÍL 2019

Sunnudagin 7.apríl vitjar føroyavinurin og prædikumaðurin **Tom Roberts (83)** av Bahamaoyggjum aftur í Føroyum. Tom Roberts hevði stóra ávirkan á andaliga lívi hjá samkomum og einstaklingum í sjeytiárunum og inn í áttatiárini. Talan verður tulkað til føroyskt og Siloakórið luttekur.

Mikukvøldið 10. apríl fara Kirstin og Símin Jóhan Samuelsen at luta orð og tankar út frá Skriftini og lívsroyndum.

<u>Páskamøtir á Skálafjørðinum:</u>

Skíriskvøld er møti í Nerija á Skála kl.19. Langafríggjakvøld er møti í Bylgjuni kl. 19 og ungdómsmøti kl. 22. Leygarkvøldið er møti í Bylgjuni kl. 19, Tom Roberts talar, ungdómsmøti kl. 22
Páskadag verður breyðbróting kl. 11, uppbyggingarmøti kl. 16 og evangeliskt møti kl.19. Nátturði verður millum møtini kl.16 oo 19.
Barnamøtir verða langafríggjadag og páskadag.

Meðan páskamøtini eru, verður onki møti í Siloa uttan breyðbróting páskadag.

Mikukvøldið 24. apríl fer fugl-firðingurin, Ragnhard Petersen, ið er leiðari fyri KFS (Kristiligur felagsskapur fyri skúlaungdóm og lesandi) at greiða frá arbeiðinum sum verður gjørt millum tey lesandi í Føroyum. KFS virkar í miðnáms-skúlunum og fróðskaparsetrinum.

Ragnhard kemur m.a. at greiða frá "**Sendiboð",** sum virkar fyri at venja kristin sendiboð (1) at hugsa klárt um sína trúgv, (2) at verja kristnu trúnna og kristnu virðini alment á dámligan hátt.

Hetta verður gjørt við at leggja dent á trý viðurskifti:
1. Vitan - tín vitan um Jesus og kristnu heimsfatanina
2. Vísdómur - hvussu tú ber hesa vitan víðari til onnur á góðan hátt.
3. Persónleiki - hvussu tú ert sum persónur

Sunnukvøldið 28. apríl eru húsbólkar á skránni. Vit savnast í nøkrum bólkum í heimunum. Tá er einki møti í Siloa.

Útgevari: Samkoman Siloa, Fuglafirði
Ábyrgd: Sofus Gregersen
Mynd á permu: Sofus Gregersen
Teldupostur: siloa@siloa.fo
**Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

Páskir!

Páskavikan í ár er mitt í apríl mánaði. Páskirnar verða vanliga nevndar høvuðshátíðin hjá teimum kristnu. Latið okkum tí nú eina løtu hugsa um hesa hátíðina.

Skírhósdagur verður hildin til minni um dagin, tá ið Jesus fyrst át páskalambið saman við lærisveinum sínum og síðani fór inn í urtagarðin, Getsemane. Undir kvøldmáltíðini gav Jesus lærisveinunum breyð og kalik og segði: "Gerið hetta til minni um Meg!"

Í Getsemane fór hann at biðja. Hann visti, at hann var komin til jarðar at doyggja á einum krossi, men nú, tað nærkaðist, stóð øgiligt á hjá honum. Hann bað til Faðir sín í himli: "Faðir Mín! Kann hesin kalikur ikki fara frá Mær – má Eg drekka hann – so verði vilji Tín!"

Í dag kunnu vit gleðast um, at Jesus segði: "Verði vilji tín!" Hevði hann borið seg undan og ikki farið út á Golgata og doyð, hevði verið illa statt hjá okkum. Einasti vegur til frelsu er deyði Jesusar – og "...blóð Jesusar, Sonar Hansara, reinsar okkum frá allari synd" (1. Jóhs. 1,7).

Langi fríggjadagur verður hildin til minni um líðing og deyða Jesusar. Eftir at hava verið fyri bæði Heródesi og Pilatusi – har hann var dømdur til deyða – og verið háðaður og húðflongdur, fór Jesus gjøgnum gøtur Jerusalems og út á Golgata – og varð krossfestur.

Tað fyrsta, Jesus segði, eftir at hermenninir høvdu neglt hann til krossin, var: "Faðir, fyrigev teimum – teir vita ikki, hvat teir gera!" Tað vísir kærleika hansara til menniskju. Eitt var, at hann vildi fyrigeva teimum. Men mundu teir taka ímóti fyrigevingini? Neyvan – og gjørdu teir ikki tað, fingu teir heldur ikki fyrigeving.

Og síðani segði Jesus – stutt áðrenn hann gav upp andan – tey væl kendu orðini: "Tað er fullgjørt!" Hann fór inn í deyðan og gjørdi bót fyri allar syndir heimsins. Tað einasta, vit hava at gera, er at trúgva, takka og taka ímóti.

Páskadagur verður hildin til minni um, at Jesus reis frá deyðum. Tað er størsta undur, sum nakrantíð er hent í søgu mannaættarinnar. Eingin trúði, at tað var gjørligt – heldur ikki hansara egnu lærisveinar ella onnur, sum høvdu fylgst við Jesusi.

Páskamorgun vóru nakrar kvinnur á veg út til grøvina at salva likam Jesusar, sum siður var tá. Men tá ið tær komu út hagar, var steinurin veltur frá grøvini og Jesus burtur. Kvinnurnar, lærisveinarnir – og øll onnur undraðust stórliga.

Men Jesus var risin frá deyðum! Hann hevði brotið deyðans veldi. Jesus livir!

Øll, ið trúgva á hann, fáa ævigt lív.

Páll á Lakjuni

SILOABLAÐIÐ

April 2019

Vísdómurin omanfrá er fyrst reinur, síðani friðsamur, mildur, lagaligur, fullur av miskunn og góðum ávøkstum, uttan flokkakenslu - og ikki bert eiti - og ávøkstur rættvísinnar verður í friði sáaður teimum, sum fáa frið í lag.
Jákupsbr. 3,17-18

Ein heilsan frá **SILOA**